## Vónin ger gransking



Líkt er til, at trolverkstaðið Vónin arbeiðir við eini granskingarverkætlan saman við einum stovni í Kanada. Vónin hevur eitt trolvirki í Nýfundlandi, men um hendan granskingarverkætlanin hevur tilknýti til hetta virkið er ikki greitt í løtuni. Hjalmar Petersen, stjóri í Vónini, vil ikki avdúka nakað um hesa verkætlanina. - Eg veit onki um, at nøkur verkætlan er byrjað. Tað er ov tíðliga at siga nakað um hetta, tí tað er ikki heilt klárt enn, sigur Hjalmar Petersen. Men hann viðgongur, at okkurt er í umbúna, sum kann verða sett í gongd heilt skjótt, um gongst sum ætlað. Sosialurin skilir, at tað kann skaða verkætlanina, um nakað lekur út longu nú. - Vandin er, at alt dettir niðurfyri, sigur Hjalmar Petersen í stuttari viðmerking.

**hs**

## Útflutningurin minkar

Fyribils tølini fyri januar og februar vísa, at føroyska samfelagið útflutti fyri 233 milliónir minni fyrstu tveir mánaðirnar sammett við 2008. Í hesum tølum er útflutningur av skipum tó ikki íroknaður. Tá hetta verður talt við, er tala n um meirútflutning upp á 109 milliónir. Tað er annars bert innan alifisk, at talan er um øktan útflutning. Innan allar aðrar vørubólkar er talan um minking í útflutningsvirðunum, hóast Hagstovan tekur fyrivarni fyri, at tølini ikki eru heilt fullfiggjað. Hartil verður sagt, at útflutningurin av uppisjóvarfiski kann sveiggja nógv mánað fyri mánað, og at fyrilit eigur at verða tikið fyri hesum, tá tølini verða lisin. Fyri uppisjóvarfisk var tlan um minking upp á 112 milliónir krónur fyrstu tveir mánaðirnar í 2008.

# Ment intranetskipan til 1,6 mió limir

**Føroyska fyritøkan Intra hjá Christian Dalsgaard hevur verið við til at ment eina intranetskipan til COOP, sum eigur FDB í Danmark. FDB hevur 1,6 milliónir limir**

INTERNET

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fleiri og fleiri føroyskar fyritøkur gera um seg uttanfyri landoddarnar. Í blaðnum í dag ber til at lesa um Formula International, sum eftir at hava fingið fótin fastan í Danmark nú er á veg víðari út á europeiska marknaðin.

Aðrar og minni kendar fyritøkur gera tó eisini um seg, og fyri stuttari tíð síðani hevur KT-fyritøkan Intra endað eitt arbeiði fyri donsku FDB, sum svarar til føroysku Keypsamtøkurnar.

- Talan er um eina innanhýsis skipan hjá FDB, sum hevur 1,6 milliónir limir. Skipanin verður millum annað nýtt til serligu gjaldskortini hjá fyritøkuni, sigur Christian Dalsgaard, sum eigur KT fyritøkuna Intra.

Christian Dalsgaard hevur starvast innan KT-vinnuna síðani 1995, millum annað fýra ár hjá Farodane.

- Í september í fjør stovnaði eg mína egnu fyritøku, serliga fyri at gera meg serkønan í forritinum Sharepoint hjá Microsoft. Hetta er størsta og skjótast vaksandi forritið hjá amerikansku fyritøkuni, sigur Christian Dalsgaard.

Hetta stigið hjá honum hevur verið tað vert, tí longu nú hevur hann fingið flri føroyskar kundan, privatar sum almennar.



*Christian Vincentz Dalsgaard tók stigið at gerast sjálvstøðugur, og tað hevur hann ikki angrað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Tilboð úr Sveits

Sharepoint er eitt forrit, sum er serliga vælegnað til intranetskipanir, tað vil siga innanhýsis skipanir. Eisini er tað vælegnað til skjalahandfaring.

*Men hvussu bar tað til, at Christian Dalsgaard fek uppgávuna frá COOP?*

- Eg fór til Danmarkar eitt langt vikuskifti, har eg vitjaði eina ráðgevarafyritøku. Longu tað fríggjakvøldið ringdi hendan fyritøkan og spurdi, um eg kundi byrja hjá teimum mánadagin eftir, so har var at handla skjótt, sigur Christian Dalsgaard.

Hendan ráðgevarafyritøkan var komin í neyð, tí teir manglaðu ein serfrøðing í Sharepoint, og soleiðis endaði hendan stóra uppgávan hjá føroysku fyritøkuni.

Christian Dalsgaard mátti so útseta heimferðina tvær vikur, og síðani ferðaðist hann millum londini bæði teir báðar mánaðirnar, uppgávan vardi.

Føroyski serfrøðingurin í Sharepoint man hava verið úti um seg, tí hann hevur nú fingið tilboð frá Microsoft í Sveits um at koma at arbeiða hjá teimum í eitt ár.

- Men tað kann eg ikki taka av. Føroyski marknaðurin er alsamt vaksandi, men tað verður óivað til onkrar uppgávur uttanlands, eisini í Sveits, men tað verðu tó ikki í eitt heilt ár, sigur Christian Dalsgaard.

Næsta, sum stendur á skránni hjá stjóranum í Intra er ein ráðstevna í Orlando í Florida.

- Jú, tað hevur lønt seg at gera seg serkønan innan Sharepoint, sigur Christian Dalsgaard.

# Føgru orðini bliknað

**- Vit høvdu nokk fingið eina ábending um, at tær stóru satsningarnar ikki fóru at verða í ár, men vit høvdu vónað eitt sindur meiri enn hetta. Sama játtan er í veruleikanum ein realniðurskurður, sigur Annika Sølvará, stjóri á Granskingarráðnum**

FÍGGJARLÓG

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonb@sosialurin.fo*
*Sosialurin/Rás2*

Fíggjarlógaruppskotið er eitt vónbrot fyri granskingina í Føroyum.

Tað sigur Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, sum umsitur Granskingargrunnin.

Játtanin til Granskingargrunnin er neyvt tann sama í ár, sammett við játtanina fyri í fjør. 6,68 milliónir krónur eru settar av til Granskingargrunnin í fíggjarlógaruppskotinum, sum varð lagt fram fyrrapartin.

Harvið rukku mongu, føgru orðini um gransking í valstríðnum, sum enntá vórðu fest á blað í samgonguskjalinum, kortini ikki inn í fyrsta fíggjarlógaruppskotið hjá nýggju samgonguni.

Í samgonguskjalinum stendur annars, at „Gransking er fyritreytin fyri bæði búskaparvøkstri og samfelagsmenning sum heild. Tí verður styrkt munandi um granskingina í breiðastu merking, eins og vinnan verður stimbrað til eisini at fara undir miðvísa gransking".

Ikki minst tí er fíggjarlógaruppskotið eitt vónbrot fyri stjóran í Granskingarráðnum.

- Vit høvdu nokk fingið eina ábending um, at tær stóru satsningarnar ikki fóru at vera í ár, men vit høvdu vónað eitt sindur meiri enn hetta. Sama játtan er í veruleikanum ein realniðurskurður, so eg eri rættiliga vónbrotin, segði Annika Sølvará.

### Vóna 2009

Gransking fylti rættiliga nógv í valstríðnum, ikki minst millum teir flokkar, sum nú mynda samgonguna. Kortini er játtanin til gransking ikki vaksin.

- Eg hevði sjálvandi vónað, at tað nú hevði eydnast at fáa gransking longur fram í politisku skipanini, men harfrá sum eg siti, síggi eg ikki enn tær stóru armrørslurar. Sjálvandi veit eg, at tað eru nógvar játtanir, men eg hevði vónað at fingið meira enn somu játtan, segði Annika Sølvará.

Hon hevur ikki sæð serliga nógv til tey lyftir, sum vórðu givin undir valstríðnum.

- Har vórðu nevnd fleiri ting innan gransking, millum annað tað neyðuga í at skapa hagtalsgrundarlag, men eg havi heldur ikki sæð pengarnar til tað, segði Annika Sølvará.

Hon viðgongur tó, at tíðin er stutt til 2009, og tá vónar hon at nakað fer at síggjast aftur á fíggjarlógini.

- Tað vóru settar tvær milliónir fleiri á uppskotið hjá undanfarnu samgongu, og eg hevði vónað, at tær í hvussu er fóru at vera á hesum uppskotinum. Tað hevur ofta verið tosað nógv um gransking, men tað manglar at gera neyðuga innsatsin fyri at koma eitt stig fram á leiðini, segði Annika Sølvará við Rás2.



*Annika Sølvará er vónbrotin av játtanini til gransking á nýggja fíggjarlógaruppskotinum hjá samgonguni*